# *E - og tónleikurin*



**Edvard Nyholm Debess, tónleikari**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
- Ja, enntá við einum klaveri dugliga varð spælt uppá.
Í dag er klaverið skift út, meðan tað gamla hjá okkum endaði niðri á Café Natúr.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
- Eg spæli kontrabass, elbass, eitt sindur guitar og klaver, og eitt, enn minni, sindur uppá okkurt annað.

*Syngur tú undir brúsuni?*
- Serliga hart um vatnið er heilt kalt.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
- Ja, og droymi enn.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
- Fyri meg er tónleikur so umráðandi, at hann fyllur meginpartin av mínum lívi.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
- Einar 1000-1200 ella harumleið.

*Hvør er tín yndisfløga?*
- Havi onga ávísa. Hetta skiftir alla tíðina sum nýtt kemur fram.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
- Eg vildi fegin átt allar fløgur um onkur gav mær pengar afturfyri. Var hon so andstyggilig kundi eg jú bara blakað hana í skrell (og behildið pengarnar) Har er ongin fløga eg ikki vildi givið ein møguleika.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
- Tann mest útspekuleraði, kensluleysi, óviðkomandi og beroknandi sangurin sum er gjørdur. Lukkutíð kenni eg hann ikki.

*Hvør er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
- Ein pláta upptikin á Ærø Folkehøjskole 1981, har eg sjálvur í orkestri spæli trummur. Tað er ikki so gott.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
- Onkran, sum hevði ljóðað hampuligt úr mínum munni. Helst eina stilla balladu hjá Stevie Wonder ella líknandi.

*Hvør er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
- Hetta kemur eitt sindur an uppá, hvussu hugnaligt kvøldið skal vera. Onkur kvøld eru still hugnalig og onkur eitt sindur meira larmut hugnalig, og so vildi eg valt tónleik, sum var bestur til endamálið.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
- Ikki so einfalt, tí eg eri í ymiskum lagi ymiskar sunnumorgnar. Mær dámar so nógvan - , og havi so nógvan ymiskan tónleik at velja ímillum at eg altíð velji okkurt sum passar seg til mitt lag.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
- Ongin tónleikur kann fáa meg í ringt lag, men eg troyttist skjótt av meiningsleysum tónleiki, sum ikki hevur nakað endamál.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
- T.d. Sildavalsurin, tí valsur er hampuliga lættur at dansa.

*Hvør er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
- Tað minnist eg ikki, men eg má sum lítil hava dámt væl sangir, tí tá eg møti mínum fyrrverandi barnagarðsdamum, siga tær altíð frá, hvussu eg dagin langan gekk har og floytaði.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
- Av egnum skrivaðum sangum má tað vera Grøna Glasið ella Til landið frá mær. Av øðrum sangum eg havi spælt inn eri eg glaðast fyri teir sum eru á mínari nýggju komandi fløgu LÖG, t.d. Aldan, Ein Firvaldur í góðum lag ella Ein gomul kista úr Kamfertræ.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
- Onkur penur sum tey sum eftir eru kunna brúka til okkurt gott.

*Hvør er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
- Tá eg eri uttanlands velji eg neyvt millum konsertirnar, so tann besta er oftast tann seinasta eg havi verið til.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
- Beint nú vildi eg helst fingið eitt langt prát við Bono úr U2.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Rúnar Reistrup, Siena — runar@reistrup.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Hvat er ein italienari?

Eg skrivi hetta teldubrævið mánadag 2. juni. Í dag er frídagur, tí italienar, nakrir teirra ið hvussu er, hátíðarhalda, at tað eru liðin 57 ár síðan, at Italia varð skipað sum republik.

Í høvuðsstaðnum Rom varð skipað fyri stórari hernaðarskrúðgongu í morgun, har lið eftir lið av vælvandum hermonnum í væl skipaðum rekkjum við størri og smærri vápnum í hond komu marsjerandi eftir Via dei Fori Imperiali. Hendan stóra og breiða vegin, sum strekkir seg stutta pettið millum Colosseum og ovurstóra hvíta tjóðarminnismerkið, læt svarta fortíðin hjá Italia, Benito Mussolini, byggja mitt ígjøgnum restirnar av gomlu rómversku forumunum.

Tey eru fá, sum í dag duga at síggja nakað gott í hesum vegi, ið fyri altíð legði ein part av stórfingnu rómversku søguni undir asfalt. Men í dag bleiv hann so brúktur sum undirlag fyri hátíðarhaldinum av italiensku republikkini, sum gjørdist veruleiki, eftir at italienar sjálvir høvdu hongt Mussolini upp í ein lyktapela.

Fyri teir flestu italienar hevði dagurin tó ikki stórt annað av týdningi, enn at teir fingu frí ein mánadag. Tí italienar eru ikki nationalistar, tvørturímóti. Orsøkirnar til, at teir ikki ganga so høgt upp í tann statin, teir eru partur av, eru í høvuðsheitum tvinnar.

Italienar hava, eins og týskarar, fyri stuttum havt vánaligar royndir við víðgongdari nationalismu. Og harumframt er Italia sum land so nýtt, bara hálvtannaðhundrað ár, at fólk her kenna seg meira sum romar, milanesar, sicilianar og so framvegis enn sum italienar. Italia kann soleiðis ofta tykjast sum fleiri hundrað lond heldur enn ein samlað eind. So meðan nationalistarnir eru fáir, eru lokalpatriotarnir nógvir, og tað speglast aftur allastaðni.

Í býnum Siena, her eg havi mín bústað í løtuni, stendur lokalpatriotisman í besta blóma. Í miðøldini var býurin ikki bara ein býur, men ein sterkur sjálvstøðugur statur. Tað ævintýrið endaði í 16. øld, tá Firenze hertók Siena og setti eitt punktum fyri stórlætistíðini hjá býstatinum. Senesar - tað kalla tey seg her - hava enn djúp horn í síðuni á fiorentinarum — tað kalla tey seg í grannabýnum Firenze - og nógvir teirra seta helst ikki síni bein í Firenze. Somu hjartabornu illkenslur hava fiorentinar um senesar. Senesar eru fyrst og fremst senesar og hareftir toscanar. Italienar eru teir sambært passinum, men ikki so nógvum øðrum.

Sama søga endurtekur seg allastaðni í Italia. Miðaldarinnar gomlu og farnu býstatir hava enn meira at siga fyri samleikan hjá fólkinum enn hálvthundrað ára gamla Italia. Og meðan gongdin í at kalla øllum øðrum europeiskum londum er, at tey ungu úr smærri býum í stóran mun flyta til størri býir, verða 85 prosent av italienarnuum, sambært hagtølunum, búgvandi minni enn 50 kilometrar frá sínum føðistað. Fara teir aðrastaðni at ganga í skúla, venda teir heimaftur til sítt upprunaumhvørvi, tá skúlagongdin er av.

Fyri ein føroying, sum hvørki er óvanur við lokalpatriotismu ella nationalismu heimanifrá, kann tað stundum tykjast sum eitt andahol at liva her fólk ikki av sær sjálvum halda seg vera best í heiminum, bara tí at tey eru italienar, føroyingar ella norðmenn fyri tann saks skyld.

Men lokalpatriotisma kann vera næstan líka troyttandi!



## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 4. juli 2003, kl. 09.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 540, Fuglafjørður (AS nr. 2-9/2003).**

Sambært tingbókini er økið á matr. nr. 540 Fuglafjørður til støddar 505 $m^2$.

Húsini hava stoypta grund og eru annars gjørd úr timbri og klødd við plastikki. Takið er úr aluminium. Takið lekur.

Um húsini er annars at siga:

Húsini eru í 3 hæddum:
Kjallarin: Er óinnrættaður.
Miðhæddin: Er durur og gongd, toilet, stova og køkur.
Loftshæddin: Er 5 kømur, 1 gongd og 1 baðiverilsi.

Húsini eru í hampiligum standi.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4476501), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
*tann 12/6-03*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2030, P/F Faryba, 100 Tórshavn.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini**: Annfinn Vitalis Hansen, á Fløtum, 180 Kaldbak (formaður), Ove Lyhne, Høneborgvej 11, DK.9340 Asaa og Niels Vinther Rasmussen, Slotsgade 28, DK-9330 Dronninglund
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Ove Lyhne, Høneborgvej 11, DK-9340 Asaa.
Felagið er tann 09.05.2003, farið í likvidatión við Annfinn V. Hansen, advokati, Bryggjubakki 22, Box 106, 110 Tórshavn sum likvidator.

*Skráseting Føroya tann 12. juni. 2003.*
*Kristin Balle*



## AKADEMIMERKONOM
### - nýggj útbúgving

Team85 • 358000

Nýggj AkademiMerkonom útbúgving byrjar á sumri 2003 á Føroya Handilsskúla. Henda útbúgvingin er ein uppstigan av "gomlu" Merkonom útbúgvingini. AkademiMerkonom er ein akademi-útbúgving, sum er útbúgvingarstigi beint undir bachelorstigi.
Í hesi nýggju Akademiskipanini eru møguleiki fyri fyribils at velja millum 4 breytir. Hesar eru:

- Altjóða Handil og Marknaðarførsla
- Búskapur- og Ressoursustýring
- Samskifti og Formidling
- og Leiðsla.

Ikki er neyðugt at velja breyt enn, tí tær lærugreinir, sum Føroya Handilsskúli bjóðar út í ár, eru lærugreinir, sum ganga aftur í øllum breytum.
Fleiri upplýsingar eru at finna á heimasíðu Føroya Handilsskúla á www.fh.fo. Møguleiki er eisini at fáa upplýsingar um Akademimerkonom-útbúgvingina á heimasíðuni hjá Undervisningsmisteriet www.uvm.dk. Millum annað eru upplýsingar at finna um avriksflutning frá gomlu merkonom útbúgvingini til akademimerkonom útbúgvingina.

**Tórshavn**

| | | |
|---|---|---|
| *** Søla og marknaðarførsla (afsætning) | mikud. | 18.00-21.20 |
| *** Vinnubúskapur | mánad. | 18.00-21.20 |

**Kambsdalur**

| | | |
|---|---|---|
| *** Altjóða búskapur | mikud. | 18.00-21.20 |
| *** Vinnubúskapur | mánad. | 18.00-21.20 |

**Upptøkutreytir**

1) Viðkomandi yrkisútbúgving við lærugreinunum Enskt C og Støddfrøði C / Virkisbúskapur C (t.d. útbúgving innan skrivstovu, handil ella handverk)
2) Viðkomandi grundútbúgving fyri vaksin við lærugreinunumm Enskt C og støddfrøði C ella Virkisbúskap C (t.d. tikin á VUC í DK)
3) Miðnámsútbúgving, antin við støddfrøði C ella Virkisbúskapi C
4) Onnur viðkomandi útbúgving svarandi til støði nevnt í pkt. nr. 1 – 3.

Stk. 2. Umsøkjarin skal hava minst 2 ára viðkomandi vinnulívsroyndir aftaná at hava lokið miðnámsútbúgving
Stk. 3. Skúlin kann taka upp umsøkjarar, sum ikki uppfylla upptøkukrøvini í stk.1, har útbúgvingartreytirnar hjá umsøkjarinum kunnu javnmetast við omanfyrinevndu krøv og treytir.
Um áhugin er nóg stórur, ber til at fylgja lærugreinum, sum verða boðin út aðrastaðni (antin í havn ella á Kambsdali). Henda undirvísing fer fram um videoráðstevnu. Tey, sum hava áhuga í hesum, skulu melda seg til í økinum, har tey búgva , men viðmerkja, at tey ynskja at fylgja undirvísingini um videoráðstevnu.

## "Gomul" Merkonom útbúgving

Føroya Handilsskúli ætlar ikki at halda fram við "gomlu" Merkonom útbúgvingina, men tó verða nakrar lærugreinir, sum serstakur tørvur og áhugi hevur verið fyri, framhaldandi boðnar út. Hesar eru:

**Tórshavn**

| | | |
|---|---|---|
| * Leiðsla og samstarv | mikud. | 18.00-20.30 |
| * Skattarættur II | mánad. | 18.00-20.30 |
| **Starvsfólkamenning | mikud. | 18.00-20.30 |
| * Arbeiðsrættur | týsd. | 18.00-20.30 |

**Kambsdalur**

| | | |
|---|---|---|
| * Skattarættur II | mánad. | 18.00-20.30 |

**Klaksvík**

* Greining og fígging
* Virkisfyriskipan

Tíðirnar verða ásettar saman við teimum lesandi fyrsta undirvísingarkvøld (eftir nærri boðum).

**Suðuroy**

| | | |
|---|---|---|
| * Leiðsla og samstarv | mánad. | 19.00-21.30 |
| * Virkisbúskapur | mánad. | 20.30–22.00 |

**Vágar**

| | | |
|---|---|---|
| * Leiðsla og samstarv | mánad. | 18.00-20.30 |
| * Innleiðsla til virkisbúskap | mánad. | 20.30–22.00 |
| * Almenn Marknaðarførsla | mikud. | 18.00-20.30 |

Ætlanin er at bjóða lærugreinina Virkisbúskap út eftir jól.

**Vanligar fortreytir, Merkonom:**
Útbúgving á handils- og skrivstovuøkinum. Hetta umfatar til dømis:
- Lærlingaútbúgving á handils- og skrivstovuøkinum
- FHS við vinnuroyndum í minst tvey ár
- HH við vinnuroyndum í minst eitt ár. **Ella**
- At umsøkjarin hevur aðra fakliga útbúgving. **Ella**
- At umsøkjarin hevur relevantar vinnuroyndir í minst tvey ár, og skúlin metir hann at vera egnaðan.

**Serligar fortreytir:**
· Grundlærugreinirnar: ongar, uttan í Virkisbúskapi
· Starvsfólkamenning : krevst at tú hevur verið teknað/ur og verið til próvtøku í Arbeiðsrætti, Leiðsla og samstarv, Starvsfólkafyrisiting.

**Ivast tú, ring og spyr eftir vegleiðara.**

## Staklærugreinar:

**Tórshavn:**
Stakroyndir (FHS)

| | | |
|---|---|---|
| Enskt C | hósd. | 18.00-20.30 |
| Virkisbúskapur C | mikud. | 18.00-20.30 |
| Kunningartøkni C | mána- og mikud. | 20.30-22.00 |
| Marknaðarførsla C | mánad. | 18.00-20.30 |

***Próvtøkur í mars/apríl 2004***

Hægri stakroyndir (HH)

| | | |
|---|---|---|
| Støddfrøði B | hósd. | 18.00-21.20 |
| Virkisbúskapur B | mikud. | 18.00-21.20 |

***Próvtøka í mai/juni 2004***

**Kambsdal:**
Stakroyndir (FHS)

| | | |
|---|---|---|
| Virkisbúskapur C | mikud. | 18.00-20.30 |
| Kunningartøkni C | mánad. og mikud. | 20.30-22.00 |
| Marknaðarførsla C | mánad. | 18.00-20.30 |
| Enskt C | mánad. | 20.30-22.00 |

***Próvtøkur í mars/apríl 2004***

Hægri stakroyndir (HH)

| | | |
|---|---|---|
| Virkisbúskapur B | hósd. | 18.00-21.20 |

**Um pláss er, kunnu aðrar staklærugreinar á FHS og HH takast á dagskúlanum. Áhugaði skulu venda sær til skúlan í Havn ella á Kambsdali.**

**Kostnaður:** (Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku )

| | |
|---|---|
| **FHS-stakroyndir, innskrivingargjald** | **kr. 350,00** |
| **HH-stakroyndir, innskrivingargjald** | **kr. 350,00** |
| **AkademiMerkonom, lærugrein (***)** | **kr. 1.500,00** |
| **Merkonom, luttøkugjald 45 t. lærugrein (*)** | **kr. 450,00** |
| **Merkonom, luttøkugjald 90 t. lærugrein (**)** | **kr. 900,00** |

**Depositum: kr. 250,00 fyri hvønn persón.**

Freistin at tekna seg til undirvísingina er 8. august 2003. Skúlagongdin byrjar í viku 36

**Umsóknarbløð:**
Umsóknarbløð eru at finna á heimasíðu handilsskúlans www.fh.fo. Eisini er møguligt at fáa umsóknarbløð við at ringja til handilsskúlan í Havn, tel 317177, ella á Kambsdali, tel 444900.

Skúlin er stongdur vegna summarfrí frá 4. juli til 11. august.

# FØROYA HANDILSSKÚLI
**Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn, Tel 317177, Fax 313374**
**Kambsdalur - 530 Fuglafjørður - Tel 444900 - Fax 444901 - www.fh.fo**